

56 upstream WORLD FEATURE 30 August 2013 30 August 2013 WORLD FEATURE upstream 57

FAROE ISLANDS

NORTH ATLANTIC HUNTING GROUNDS

Statoil keeps faith as it ploughs cash into chasing huge potential

EXPLORATION DRIVE

Norwegian commits to wells, despite high risks

Faroes late to the table but interest is growing

Despite 12 out of 19 licences being relinquished since 2000, Atlantic Margin player is seeing a revival following sizeable discoveries made nearby in West of Shetland area

MARINTEC CHINA 2013

The All China Maritime Conference & Exhibition

二〇一三年中国国际海事技术学术会议和展览会

3-6 December 2013

Shanghai New International Expo Centre

二〇一三年十二月三至六日

上海新国际博览中心

WE'RE MOVING INTO THE SURF SEGMENT. MAKE YOUR MARK JOIN US!

DEEPOCEAN

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 31 - 08 - 2013

# Føroysk oljuleiting nógv pláss í altjóða oljublað

Tað er sjáldan, at Føroyar og føroysk viðurskifti sleppa á breddan í stórum altjóða bløðum. Og hetta kunnu tey, sum arbeiða við oljuleiting og føroyskari oljuvinnu nikka játtandi til. Oljumiðlar løgdu pláss til, tá Føroyar lótu fyrstu leitiloyvini í 2000, og tá Marjunfundið varð gjørt árið eftir. Men síðani hevur mest sum valdað tøgn. Til seinasta fríggjadag. Undir yvirskriftini Faroes late to the table but interest is growing, Føroyar seint til borðið men áhugin er vaksandi, viðger hetta heimsins størsta oljublað, UPSTREAM, føroysku oljuleitingina á heilum tveimum síðum. Sigast má, at umframt at fáa so nógva umrøðu í hesum týðandi oljublað, kann sjálv timingin neyvan verða betri vald. Júst henda eina útgávan er nevniliga tað blaðið, sum Upstream fyritøkan marknaðarførir seg við á altjóða oljumessuni í Aberdeen, Offshore Europe, har fleiri enn 50.000 fólk vitja teir meira enn 3000 básarnar úr meira enn 100 londum. Fyri Føroyar og føroyska oljuleiting kann hetta metast sum einki minni enn bingo. Norski journalisturin hjá Upstream, Beate Schjølberg umrøður í tveimum greinum oljuleitingina fram til í dag og leggur serstakan dent á komandi boringar hjá Statoil og øðrum oljufeløgum. Hon hevur samrøðu við Rúna M. Hansen, stjóra í Statoil og við stjóran í FOÍB, Jan Müller, sum greiða frá gongdini, møguleikum og avbjóðingum. Upstream við dupultsíðu um Føroyar og oljuleiting